# LØGMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 30.08.2023 |
| Mál nr.: | 23/15652 |
| Málsviðgjørt: | GMN |
| Ummælistíð: | 30.08 – 27.09.23 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um revsing (Revsilógin)

(Um kynsliga avnoyðslu og lokking)

**§ 1**

Í Revsilógini, sambært løgtingslóg nr. 215 af 24. juni 1939 um revsing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr xx? frá xx? 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 225 verður orðað soleiðis:

"**§ 225**. Ásetingarnar í §§ 216-224 eru eisini galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu. Ásetingarnar eru somuleiðis galdandi, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan."

**2.** Í § 228 verður "ella § 227, stk. 1" broytt til: ", § 227, stk. 1 ella § 229".

**3.** Aftaná § 228 verður sett:

"**§ 229**. Fyri lokking verður tann revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár, sum miðvíst ella við snildir og við at misnýta sína yvirvág í aldri og royndum byggir upp eitt samband til ein persón undir 18 ár við ætlan um at fremja kynsligt brotsverk móti viðkomandi."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Eitt størri mál um kynsligan ágang móti børnum og ungum er komið fram í Føroyum. Talan er um misnýtslu av børnum á netinum, har gerningsmenninir hava roynt at lokka barnið ella tann unga at møta sær við tí ætlan at fremja kynsligt brotsverk móti barninum ella tí unga. Talgilda menningin hevur haft við sær, at talgildur ágangur, eitt nú deiling av kynsligum myndum og talgildar hóttanir, er sera nógv øktur seinastu árini.

Ongar beinleiðis ásetingar eru í revsilógini viðvíkjandi lokking.

Kynslig avnoyðsla (sextortion) á netinum gerst eisini meira vanlig. Seinastu árini hava verið fleiri søgur, serliga um ung, sum verða hótt til at fremja kynsligar gerðir við sær sjálvum.

Mett verður, at tað er neyðugt at fáa reglur viðvíkjandi hesum í føroysku revsilógina sum skjótast.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*Kynslig avnoyðsla*

Kynslig avnoyðsla, har ein persónur  verður hóttur til at fremja kynsligar gerðir á sær sjálvum, minnir nógv um neyðtøku og kynsliga misnýtslu. Hóast hetta kann ein persónur, sum noyðir ein annan til at gera kynsligar gerðir á sær sjálvum, ikki revsast sambært § 225 í revsilógini, sum viðvíkur aðrar kynsligar gerðir enn samlegu (t.e. samlegulíknandi gerðir).

Orsøkin til, at tað ikki kann revsast sambært § 225 er, at tað er lagt til grund, at tað skal vera kropsligt samband millum tveir persónar fyri at nýta § 225. Eftir galdandi lóg kann tað eftir umstøðunum ístaðin revsast fyri ólógligan tvingsil og fyri blúnisbrot.

*Revsing fyri ósketni í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða*

§ 228 í revsilógini ásetir at brot á ávísar ásetingar í revsilógini kann revsast, hóast gerningsmaðurin bert hevur verið ósketin í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða.

*Lokking*

Ongar beinleiðis ásetingar eru um lokking í kapittul 24, sum viðvíkur kynslig brotsverk. Eftir umstøðunum kann lokking tó revsast eftir øðrum ásetingum í kapittul 24, eitt nú sum roynd at fremja kynsligt brotsverk, roynd at fremja blúnisbrot ella roynd at taka upp, hava um hendi ella breiða út kynsligt tilfar við ein persón undir 18 ár.

Hóast lokking kann revsast eftir øðrum ásetingum í revsilógini, kann tað vera trupult at prógva tilætlan, serliga tí tað ikki er greitt, hvat ítøkiliga brotsverkið er, sum ætlanin er at fremja.
Samstundis tekur galdandi lóggáva ikki atlit at kensluni av skuld og samábyrgd, sum barnið ella tann ungi ofta kennir.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Tað er ein sannroynd, at revsilógin ikki í nóg stóran mun hevur fylt við talgildu menningini og talgilda veruleikanum.

Endamálið við uppskotinum er at dagføra kapittul 24 í revsilógini um kynslig brotsverk, soleiðis at revsilógin á hesum økinum er meira tíðarhóskandi.

Alnetið er í dag ein stórur partur av veruleikanum hjá okkum øllum og serliga hjá børnum og ungum. Alnetið verður nýtt at hava samband við vinir og kenningar og til at hitta nýggjar vinir.

Samstundis hevur hetta givið persónum, sum vilja fremja kynsligan ágang móti børnum og ungum, fleiri møguleikar at koma í samband við hesi m.a. við at geva seg út fyri at vera ein annar.

Hóast lokking og kynslig avnoyðsla í ávísum førum kann revsast sambært øðrum ásetingum í revsilógini, so kann próvbyrðan verða torfør at lyfta.

Uppskotið skal tryggja, at tað í størri mun verður møguligt at døma fyri kynsliga avnoyðslu og fyri lokking.

Samstundis verður gjørt greitt fyri børn og ung, at tað ongantíð er teirra skyld, at tey eru fyri kynsligum ágangi.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

### *1.4.1. Kynslig avnoyðsla*

Støður tá ein persónur verður hóttur til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan, er ikki fevnt at § 225 í dag, hóast støðan á nógvar mátar líkist neyðtøku.

Ásetingin hevur sín uppruna í revsilógini frá 1866, og hóast ásetingin er broytt nakrar ferðir, samsvarar galdandi áseting ikki við nútíðar samfelagið. Eitt nú er ásetingin ikki í samsvari við tøkniligu menningina, sum hevur haft við sær, at kynsligar brotsgerðir nú eisini fara fram á talgildum pallum.

§ 225 ásetir, at §§ 216 – 224 eisini eru galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu. Við kynsligar gerðir, verður sipað til samlegulíknandi gerðir. Í hesum liggur, at tað skal vera kropsligt samband millum tveir persónar fyri at nýta § 225.

Í ávísum førum kann í staðin revsast fyri ólógligan tvingsil og fyri blúnisbrot.

Við uppskotinum verður skotið upp, at eisini støður, har ein persónur verður noyddur til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan, framyvir skulu verða fevndar av § 225.

### *1.4.2. Revsing fyri ósketni í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða*

Skotið verður upp, at ásetingin viðvíkjandi lokking, verður fevnd av § 228, sum ásetir, at brot á ávísar ásetingar í revsilógini kann revsast, hóast gerningsmaðurin bert hevur verið ósketin í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða.

Broytingin hevur við sær, at brot á lokkingarásetingina, sum vegna ókunnleika hjá gerningsmanninum um tilstandin ella aldurin hjá órættaða, ikki kunnu ábyrgjast gerningsmanninum sum tilætlað, kunnu revsast við ein lutvíst linari revsing, um gerningsmaðurin tó hevur handlað í ósketni.

Hvørt talan er um neyðuga tilætlan til at fremja brot á lokkingarásetingina, herundir í mun til aldur hjá órættaða, má avgerast út frá ítøkiligu umstøðunum í málinum.

### *1.4.3. Lokking*

Við lokking meinast støður, har ein persónur byggir upp eitt álitissamband við eitt barn ella ein ungling, við tí endamáli at fremja kynsligt brotsverk ímóti viðkomandi ella at lokka tey at senda nakinmyndir ella myndir av kynsligum slagi.

Tað er í revislógini ikki í nóg stóran mun tikið hædd fyri, at kynsligur ágangur ímóti børnum og ungum í størri og størri mun fer fram á netinum. Tað er heldur ikki tikið hædd fyri, at alnetið ger tað lætt hjá pedofilum at koma í samband við børn og ung við at geva seg út fyri at vera ein annar.

Hetta hevur við sær, at nógv børn og ung kenna, at tey sjálvi hava skyldina í íkomnu støðuni, og kenna, at tey hava samábyrgd fyri, at tey hava latið seg lokkað.

Ongar ásetingar eru um lokking í kapitli 24 i revsilógini um kynslig brotsverk. Ístaðin kann mann eftir galdandi lóg revsast fyri roynd at fremja kynsligt brotsverk, roynd at fremja blúnisbrot ella roynd at taka upp, hava um hendi ella breiða út kynsligt tilfar við ein persón undir 18 ár.

Við uppskotinum verður ein nýggj áseting sett inn í revsilógina, sum ger lokking revsivert. Ætlanin er, at revsiramman fyri brot á ásetingina verður sekt ella fongsul upp í 2 ár.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið verður sent beinleiðis til ummælis hjá hesum pørtum:

Føroya Rætti, Føroya Landfúti, Kriminalforsorgini, Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Advokatfelag, Almanna- og mentamálaráðnum, Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Føroya Kommunufelag, Barnaverndarstovuni, Barnabata, Brotsfrøðifelag Føroya, MEGD, Amnesty International Føroyar, Føroya Politistafelag, Føroyskir Sálarfrøðingar, Etiska Ráðnum, KRIS, Kvinnuhúsinum og Kvinnufelagnum.

Uppskotið verður eisini lagt alment út á ummælisportalin hjá landsstýrinum.

Ummælistíðin er frá 30. august til 27. september 2023.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar við sær fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin hevur virkað frá 31. august 2005. Sáttmálin skipar Føroyar og Ísland sum eitt búskaparøki, har tað innan fyri innihaldsvídd sáttmálans er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna. Lógaruppskotið er ikki viðkomandi í mun til innihaldið í Hoyvíkssáttmálanum.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar sum lóg tann 1. mai 2000 við *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.*

   Evropeiski Mannarættindasáttmálin hevur til endamáls at verja borgarar í teimum evropeisku londunum ímóti mannarættindabrotum. Sáttmálin varð samtyktur í Evroparáðnum í 1950 við íblástri frá heimsyvirlýsingini hjá ST.

   *§ 1, nr 1- 3*
   Viðvíkjandi ásetingunum um kynslig brotsverk í kapitli 24 kann vísast á, at sambært EMRS, artikkul 3, má eingin verða píndur ella vera fyri ómenniskjaligari og mannminkandi viðferð ella revsing. Eisini sæst, at í artikkul 8, stk. 1, at øll hava rætt til virðing fyri egnum privatlívi og familjulívi, sínum heimi og samskifti.

Ásetingarnar um kynsliga avnoyðslu og lokking verða mettar at stuðla undir hesar artiklar. Revsilógin hevur ikki í nóg stóran mun fylgt við talgilda veruleikanum og við hesum ásetingum, verður revsilógin meira tíðarhóskandi.
Inntrivini eru ásett í lóg og verða mett neyðug í einum demokratiskum samfelagi (t.v.s. lúka treytina um proportionalitet) fyri at fyribyrgja brotsverkum og verja útsettir borgarar.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Sáttmálin fekk gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Mett verður ikki, at lógaruppskotið gevur fólki við breki betri ella verri rættindini. Støðan má metast at vera óbroytt.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið tarnar ikki flytførið hjá tí einstaka borgaranum ella umstøðurnar hjá fyritøkum at virka um landamørk millum Føroyar, Danmark og Grønland. Uppskotið hevur tí ikki markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Endamálið við lógaruppskotinum er í stóran mun at herða revsingina fyri nøkur av teimum mest álvarsomu persónligu brotsverkunum, sum eru. Endamálið er, at revsingin í størri mun enn sambært galdandi rætti skal endurspegla ta skemd, sum órættaði er fyri.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Tað eru ongar ásetingar um skatt ella avgjøld í lógaruppskotinum.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til nakran landsstýrismann.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið kann hava við sær nakað av fíggjarligum avleiðingum fyri politiið, ákærumyndugleikan, dómstólarnar og kriminalforsorgina av tí at talan er um at kriminalisera nýggj brotsverk. Ríkiskassin rindar útreiðslurnar av hesum, tí talan er um ríkismyndugleikar.

Uppskotini um kynsliga avnoyðslu og lokking verða mett at stuðla undir partmál 16.2 í verðins málinum, sum viðvíkur, at øll sløg av harðskapi, misnýtslu, mannahandli og øll sløg av harðskapi og píning av børnum skulu steðgast.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

***Nr. 1***
*Kynslig avnoyðsla*

Við uppskotinum verður skotið upp, at § 225 í revsilógini verður víðkað til at fevna um føri, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan.

Sambært § 225 eru ásetingarnar í §§ 216 – 224 eisini galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.

Ásetingarnar í §§ 216 – 224 í revsilógini fevna millum annað um neyðtøku, samlegu fingin við ymiskum slagi av misnýtslu av serligari støðu ella onnur misnýtsla ella samlega við barn undir 15 ár.

Ásetingarnar í §§ 216 – 224 verða einans nýttar beinleiðis, tá ið talan er um samlegu. § 225 víðkar sostatt um virkisøkið til eisini at fevna um aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.

Aðrar kynsligar gerðir fevna um gerðir, sum minna um samlegu, koma í staðin fyri samlegu ella annars í mun til tann skemmaða ella misnýtta partin fevnir um kynsligt brotsverk, sum nærkast samlegu. Vanliga skal talan minst verða um beinleiðis samband í millum kynslut hjá øðrum og likamið hjá hinum. Sum dømi um aðrar kynsligar gerðir kann nevnast oral samlega, koss o.a. á kynslut, at fingrar ella lutir verða koyrdar í skeiðina ella handfaring av mannliga kynsliminum.

Við uppskotinum er ætlanin, at tær gerðir, sum eftir galdandi rættarvenju eru fevndar av § 225, um gerningsmaðurin ella onnur fremja tær á órættaða, í ávísum førum, eisini verða fevndar av ásetingini, um órættaða fremur gerðirnar á seg sjálvan. Tað er ikki ætlanin at broyta virkisøkið fyri § 225 á aðrar mátar.

Eitt dømi um tilburðir, sum eftir umstøðunum framyvir kundi verið fevndir av § 225, er tá ið ein gerningsmaður, t.d. við at hótta við at deila nakinmyndir av órættaða, fær órætta til at koyra fingrar ella lutir í skeið ella endatarm ella til at handfara mannliga kynslimin.

Ásetingin kann nýtast, hóast gerningsmaðurin ikki er í sama høli sum órættaði og t.d. vegleiðir órættaða í at at fremja gerðirnar gjøgnum videokjatt.

Tað er ein treyt, sambært nýggja ásetingini, at gerningsmaðurin hevur fingið órættaða til at fremja eina gerð fevnd av §§ 216-224 í revsilógini. Treytin hongur saman við vanligu krøvini til brotsgerðarevni (gerningsindhold) i §§ 216-224, sum eisini skulu verða lokin. Krøvini til gerðir hjá gerningsmanninum vilja somuleiðis valdast brotsgerðarevni í tí áseting, sum víst verður til.

Treytin um, at gerningsmaðurin skal hava fingið órættaða til at fremja nevndu gerðir, ber í sær, at føri har órættaði sjálv/sjálvur tekur stig til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan í hjáveru av einum øðrum persóni, uttan nakað slag av beinleiðis ella óbeinleiðis ávirkan frá einum

øðrum persóni, ikki kunnu verða fevnd av § 225. Tað skal sostatt verða eitt ávíst orsakasamband í millum virksemi hjá gerningsmanninum og tær gerðir, sum órættaða fremur.

Kravið um, at gerningsmaðurin hevur fingið órættaða til at fremja nevndu gerðir á seg sjálvan, vil eftir umstøðunum kunna verða lokið, um brotsgerðarevni (gerningsindholdet) í § 216, stk. 1 í revsilógini er lokið. Um órættaða ikki hevur samtykt í tilburðinum, vilja gerðir, sum órættaða fremur á seg sjálvan, sostatt møguliga verða eitt brot á § 216, stk. 1 samanber § 225 í revsilógini. Um tað er samtykki til gerðina, er spurningurin, um persónin fremur gerðina av fríum vilja. Tað er rætturin, sum eftir eini heildarmeting av øllum umstøðum í málinum, tekur avgerð um eitt samtykki er givið í ítøkiliga førinum.

Eitt samtykki er ikki galdandi í teimum førum, har gerningsmaðurin við hóttanum um harðskap ella við ólógligum tvingsli hevur tvingað órættaða til at fremja gerðina. Hetta vil t.d. verða galdandi um gerningsmaðurin hóttir við breiða nakinmyndir av órættaða út alment, um órættaða ikki fremur kynsligar gerðir á seg sjálvan.

Mótsett brot á § 216, stk. 1 samanber § 225 í revsilógini, sum verða framd av gerningsmanninum við fysiskar gerðir, verður tað sett krav um ávíst virksemi frá órættaða, sum skal fremja gerðirnar á seg sjálvan. Støður, har órættaði er óvirkin vegna eina ótilvitaða ræðslustøðu, og støður, har órættaði ikki er førur fyri at fremja nakrar gerðir, t.d. vegna svøvn ella tí viðkomandi er ávirka av rúsdrekka, sum annars eftir galdandi lóggávu er fevnt av § 216, stk. 1 samanber við § 225 í revsilógini, vil sum málið er, hava við sær, at órættaði ikki megnar at fremja gerðir, sum eru fevndar av víðkanini av § 225.

Hetta hevur við sær, at tað í roynd og veru skulu verða dømi um tvingsil, hóttanir, avnoyðslu ella aðrar umstøður, sum benda á, at tað ikki er nakað lógligt samtykki – antin áðrenn ella í samband við tilburðin – fyri at gerðir, sum órættaði hevur framt á seg sjálvan, eru fevndar av § 216, stk. 1 samanber § 225 í revsilógini. Um órættaði t.d. at byrja við noktar at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan, men síðani játtar, og tað ikki er prógv fyri skelkandi ella hóttandi umstøður áðrenn ella í samband við tilburðin, kann tað ikki staðfestast tilætlan hjá gerningsmanninum til, at gerðirnar eru framdar uttan samtykki frá órættaða.

Ásetingarnar í § 218 (misnýtsla av annans sálarsjúku ella sálarliga menningartarn), § 220 (grov misnýtsla av annans arbeiðsliga, fíggjarliga, viðgerðarliga ella røktarliga bundinskapi), § 221 (sníkjan til samlegu) og § 224 (prostitutión av persóni undir 18 ár) hava sum fyritreyt eftir sínum innihaldi, at gerningsmaðurin hevur haft ein virkin leiklut í samband við at fáa órættaða til at fremja kynsligar gerðir, og tað vil tí ikki í hesi føri verða neyðugt sjálvstøðugt at føra prógv fyri, at gerningsmaðurin fekk órættaða til at fremja gerðirnar, um treytirnar fyri at døma eftir hesi somu ásetingum annars eru uppfyltar.

Treytirnar fyri, at gerningsmaðurin skal hava fingið órættaða til at fremja ta kynsligu gerðina, vil hinvegin kunna fáa sjálvstøðugan týdning í samband við § 216, stk. 2 (samlega við barn undir 12 ár), § 219 (samlega við persóni sum er undir umsjón av gerningsmanninum), § 222 (samlega við barn undir 15 ár) og § 223 (samlega við persón undir 18 ár, sum er litin gerningsmanninum upp í hendur til undirvísingar ella uppalingar).

Hetta kemst av, at nevndu ásetingar allar hava eitt fullkomið forboð móti kynsligum sambandi. Tað er sostatt eftir ásetingunum ikki avgerandi, um órættaða hevur givið samtykki, eins og tað ikki hevur týdning fyri ábyrgdarmetingina, hvør hevur tikið stig til tað.

Ásetingarnar í § 225 um, at gerningsmaðurin skal hava fingið órættaða til at fremja hesa gerð vil í samband við hesar ásetingar týða, at tað í mun til tílík mál, skal førast prógv fyri, at gerningsmaðurin fekk órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan, og at gerningsmaðurin hevði tilætlan til hetta.

Við atliti til, at nevndu ásetingar hava eitt fullkomið forboð móti kynsligum sambondum, vil markið fyri, hvørji krøv sum skulu setast til virksemið hjá gerningsmanninum, verða rættiliga lágt. Tað er ikki ein fyritreyt, at gerningsmaðurin hevur tikið stig til kynsligu gerðina, og tað vil tí eftir umstøðunum t.d. kunna verða nokk, at gerningsmaðurin hevur eggjað órættaða til at halda áfram við eini kynsliga gerð, sum órættaði sjálvur hevur tikið stig til.

Ein støða, har gerningsmaðurin við at lokka ella við onnur sløg av snildi hevur fingið eitt barn undir 15 ár, ella ein persón undir 18 ár í einum lærara/næminga sambandi til at fremja eina kynsliga gerð á seg sjálvan, vil sostatt vera fevnd av nevndu ásetingum.

Tilburðir, har eitt barn undir 15 ár ella ein persónur undir 18 ár í einum lærara/næminga sambandi sjálvt/sjálvur hevur tikið stig til at fremja eina kynsliga gerð á seg sjálvan, meðan ein annar persónur hyggur, uttan nakað slag av beinleiðis ella óbeinleiðis ávirkan frá nøkrum øðrum persóni, vilja hinvegin ikki verða fevndir av ásetingini.

Um víðkanin av § 225, sum skotin er upp, skal nýtast, er tað ein greið fyritreyt, at gerningsmaðurin er hjástaddur ella tekur ímóti eina mynd, einum video ella líknandi av kynsligu gerðini.

Tilburðurin skal metast eftir tí áseting, sum er viðkomandi, um brotið er framt eftir teimum umstøðum, sum ásetingin annars treytar. Hetta hevur við sær, at um gerningsmaðurin fær órættaða, sum er 15 ár ella eldri, til at koyra lutir í egnan kynslut ella endatarm ella stimulera egnan naknan kynslut, skal tilburðurin vísa til § 216, stk. 1 samanber við § 225 í revsilógini. Um órættaði er undir 15 ár, skal tilburðurin metast eftir § 222 samanber § 225 í revsilógini, og um órættaði er undir 18 ár og er fosturbarn hjá gerningsmanninum, næmingur ella líknandi skal tilburðurin metast eftir § 223, stk. 1 samanber § 225 í revsilógini.

Um gerningsmaðurin tvingar órættaða til at gera minni grovar gerðir á seg sjálvan, t.d. at røra egin bróst, kann tilburðurin eftir umstøðunum verða blúnisbrot, sum er fevnt av § 232 í revsilógini ella ólógligur tvingsil, sum er fevndur av § 260 í revsilógini.

Tá ið revsing verður ásett, eiga dómstólarnir at leggja dent á somu umstøður, sum annars gera seg galdandi, tá ið revsing verður ásett fyri kynslig brotsverk. At órættaða sjálv hevur framt kynsligu gerðirnar, skal ikki í sjálvum sær, verða grund til, at revsingin verður ásett lægri samanlíkna við føri, tá ið gerningsmaðurin fremur gerðirnar móti órættaða. Ásetingin av revsingini vil tó framvegis valdast ítøkiligu metingini hjá rættinum av øllum umstøðum í málinum í hvørjum einstøkum føri.

***Nr. 2***
*Revsing fyri ósketni í mun til tilstandin og aldurin hjá órættaða*

Sambært § 228 í revsilógini, kunnu brot á §§ 218 ella 222-224, § 225 samanber §§ 218 ella 222-224, § 226 ella 227, stk. 1, sum vegna ókunnleika hjá gerningsmanninum um tilstandin

ella aldurin hjá órættaða, ikki kunnu ábyrgjast gerningsmanninum sum tilætlað, revsast við ein lutvíst linari revsing, um gerningsmaðurin tó hevur handlað í ósketni.

Viðvíkjandi aldur fevnir § 228 um 15 ára markið í § 222, stk. 1, og 18 ára markið í §§ 223, 224, 226 og § 227, stk. 1.

Skotið verður upp, at tað í § 228 verður sett ein tilvísing til nýggju ásetingina um lokking í § 229, samanber § 1, nr. 3 í uppskotinum.

Broytingin vil hava við sær, at brot á nýggja § 229 um lokking, sum hevur eitt aldursmark uppá 18 ár, tá ið brot, vegna ókunnleika hjá gerningsmanninum um tilstandin ella aldurin hjá órættaða, ikki kann sigast av verða tilætlað, kann revsast lutvíst linari, um gerningsmaðurin tó hevur handlað í ósketni.

Sum dømi um atburð, sum eftir umstøðunum kundi verið fevndur av ásetingini, kann nevnast føri, tá ið geringsmaðurin ikki hevur fingið aldurin hjá órættaða, ella har órættaða ikki hevur upplýst aldurin rætt, men har gerningsmaðurin átti at hava vist, at órættaða var undir 18 ár, t.d. vegna útsjónd og búning, ella tí sambandi er íkomi á einum palli, har høvuðsparturin av brúkarnum eru undir 18 ár.

***Nr. 3***
*Lokking*

Galdandi lóg hevur ongar serligar ásetingar um lokking. Við lokking skilst ein støða, har ein persónur uppbyggir eitt álitissamband við eitt barn ella ein unglinga við tí ætlan, at fremja kynslig brot móti viðkomandi ella at lokka barnið ella tann unga til at senda nakinmyndir ella myndir av kynsligum slagi.

Lokking kann eftir umstøðunum revsast eftir øðrum ásetingum í revsilógini, t.d. sum roynd at fremja kynsligt brotsverk, blúnisbrot ella fyri at taka upp, hava um hendi ella breiða út kynsligt tilfar við einum persóni undir 18 ár.

Lokking kann t.d. eftir umstøðunum verða revsivert sum roynd at bróta § 216, stk. 2 í revsilógini, sum viðvíkur, at samlega við barn undir 12 ár verður revsað sum neyðtøka ella § 222 sum brotsliggerð samlegu við barn undir 15 ár. Sambært § 225 kunnu ásetingarnar í § 216, stk. 2 og og § 222 somuleiðis nýtast í samband við aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.

Harafturat kann lokking eftir umstøðunum vera revsivert sum blúnisbrot sambært § 232 í revsilógini.

Um gerningsmaðurin t.d. í samband við samskifti við barnið ella tí unga fær tey til at senda myndir ella videoir við pornografiskum innihaldi, kann tað eftir umstøðunum revsast fyri brot eftir § 236, stk. 2 í revsilógini, sum viðvíkur kynsligt tilfar av persónum undir 18 ár. Revsingin er sekt ella fongsul í upp til 1 ár.

Skotið verður upp, at ein nýggj áseting verður sett inn í revsilógina sum § 229. Sambært ásetingini verður tann, sum miðvíst ella við snildum og við at misnýta sína yvirvág í aldri og royndum byggir upp eitt samband við ein persón undir 18 ár við ætlan um at fremja kynsligt brotsverk móti viðkomandi, revsaður fyri lokking við sekt ella fongsli í upp til 2 ár. Ein treyt

fyri at revsa eftir ásetingini er, at gerningsmaðurin byggir upp eitt samband til ein persón undir 18 ár. Við hesum skal skiljast, at eitt samband verður grundlagt millum partarnir, sum kann verða persónligt, skrivligt ella talgilt, og sum mennist yvir tíð.

Uppbyggingin av sambandi til barnið ella tann unga, vil vanliga fara fram í stigum, har gerningsmaðurin stigvíst roynir at menna sambandið, soleiðis at barnið ella tann ungi sær gerningsmannin sum ein trúnaðarvin, og har gerningsmaðurin fyrst seinni í hendingargongdini avdúkar kynsliga evnið í sambandinum.

Kravið um, at eitt samband verður uppbygt við ein persón undir 18 ár, ber í sær, at tað sum høvuðsregla skal vera talan um fleiri føri av sambandi millum gerningsmannin og persónin undir 18 ár, fyri at ásetingin skal kunna nýtast. Einstøk føri av sambandi við kynsligum innihaldi kann tó eftir umstøðunum í staðin vera fevnt av § 232 um blúnisbrot.

Ásetingin kann tó eisini nýtast í samband við einstøk føri av ikki kynsligum sambandi, um aðrar umstøður byggja undir, at sambandið verður tikið við tí endamáli at uppbyggja eitt samband, t.d. tí gerningsmaðurin sendir eini lokkandi boð til eitt barn undir 15 ár, og gerningsmaðurin í øðrum førum av lokking, hevur nýtt sama framferðarhátt. Tað er tó ein fyritreyt, at tað kann førast prógv fyri kynsligari tilætlan.

Tað er ikki avgerandi fyri nýtsluna av ásetingini, sum verður skotin upp, at gerningsmaðurin hevur tikið stig til øll føri av sambandi millum partarnir. Tað kann sostatt verða talan um, at barnið ella tann ungi fleiri fylgjandi ferðir hevur vent sær til gerningsmannin, har uppbyggjan av sambandi framvegis er fevnt av ásetingini.

Um órættaði er undir 15 ár, og tí undir kynsligan lógaldur, er ætlanin hjá órættaða við sambandinum, uttan týdning fyri, um brotsgerðarevni er uppfylt. Nýggja ásetingin fer sostatt at fevna um føri, har gerningsmaðurin fær sambandið millum partarnir til at menna seg ein kynsligan veg, hóast tað er barnið, sum er undir 15 ár, sum tekur stig til at seta gerningsmanninum spurningar við kynsligum innihaldi.

Um órættaða er fyltur 15 ár og tí omanfyri kynsliga lógaldurin, skal tað hinvegin leggjast dent á, hvat endamálið hjá órættaða er við sambandinum. Hóast órættaði hevur havt ein virknan leiklut í, at sambandið hevur ment seg, útihýsir ikki, at ásetingin eftir umstøðunum kann nýtast, t.d. um gerningsmaðurin hevur sýnt grovt manipulerandi framferð, sum hevur verið avgerandi fyri, at órættaði er í samband við gerningsmannin.

Tað er ein fyritreyt fyri at nýta ásetingina, at uppbygingin av sambandi hendir miðvíst ella við snildum móti einum persóni undir 18 ár.

Treytin um at uppbyggingin skal vera miðvís, vil vera uppfylt, um gerningsmaðurin setir seg í samband við fleiri børn ella ung á sama miðvísa hátt, t.d. við á sama hátt at taka upp samband gjøgnum alnetið, ella á serligum sosialum miðlum ella líknandi.

Treytin um at sambandið verður bygt upp við snildir, kann t.d. vera uppfylt, um gerningsmaður letur sum um, at hann er eitt barn um sama aldur, sum barnið, hann samskiftir við. Hetta kann eitt nú gerast við at beinleiðis at siga aldurin ella við eitt nú at broyta málbrúk fyri á tann hátt at villleiða barnið til at halda, at tey bæði eru javnaldrandi. Eitt annað dømi um snildir, kundi verið, at gerningsmaðurin letst vera ein myndatakari ella ein persónligur venjari við tí endamáli at fáa barnið ella tann unga at senda nakinmyndir ella líknandi. Somuleiðis vil tað t.d. kunna

verða snildir, um ein gerningsmaður gjøgnum sítt arbeiði, t.d. sum handilsmaður, uppbyggir eitt tætt samband til eina familju, soleiðis at hann kann vitja í heiminum og bjóða barnaansing, við tí ætlan seinni at fremja kynslig brotsverk móti børnunum.

Tað vil harafturat vera ein treyt fyri nýtslu av ásetingini, at uppbyggingin av sambandi er hent við at misnýta yvirvág í aldri og royndum. Hugtakið skal skiljast í samsvari við sama hugtak í § 223, stk. 2, sum viðvíkur at forføra ein persón undir 18 ár til samlegu við grovliga at misnýta yvirvág í aldri ella royndum.

Treytin ber í sær, at ásetingin bert kann nýtast í føri, tá ið gerningsmaðurin er eldri enn órættaði. Um partarnir eru nær í aldri, royndum og menning, vil tað eftir umstøðunum kunna hava við sær, at revsiábyrgd ikki kann staðfestast.

Um órættaði er fylt 15 ár, vil tað vanliga setast hægri krøv til munin í millum aldur hjá geningsmanninum og órættaða og mun í royndum og menning, enn tá ið órættaði er undir 15 ár.

Tað vil somuleiðis vera ein fyritreyt fyri at nýta ásetingina, at gerningsmaðurin hevur tilætlan til at fremja kynslig brotsverk í móti barninum ella tí unga. Við kynsligt brotsverk skal skiljast ein gerð, sum er revsiverd eftir einari ella fleiri ásetingum í kapitli 24 í revsilógini. Tað er sostatt avgerandi fyri nýtslu av ásetingini, at gerningsmaðurin hevur tilætlan til at fremja eitt kynsligt brotsverk í samsvar við kapittul 24 í revsilógini. Tað vil hinvegin ikki vera avgerandi, um tað kann staðfestast, hvørja áseting í kapitli 24 gerningsmaðurin hevði tilætlan til at bróta.

Tað er ein treyt, at endamálið við at byggja upp sambandið er at fremja eitt kynsligt brotsverk. Tað er tó ikki neyðugt, at tilætlanin er tilstaðar um tað mundið, tá ið gerningsmaðurin fyrst setir seg í samband við barnið ella tí unga, men vil eisini kunna koma meðan sambandið mennist.

Hvørt neyðug tilætlan er til at bróta uppskotna ásetingina, má avgerast við støði í ítøkiligu umstøðunum í málinum.
Tað sama er galdandi, tá ið talan er um ósketni, samanber uppskotna broytingina í § 228 í revsilógini samanber § 1, nr. 2 í lógaruppskotinum.

Tað skal somuleiðis skiljast í millum um persónurin, sum verður lokkaður, er yvir ella undir kynsliga lógaldurin.

Um talan er um eitt barn undir 15 ár, vil eitthvørt kynsligt samband vera revsivert, óansæð um barnið samtykkir til tað ella ikki. Tað skal sostatt leggjast dent á, um gerningsmaðurin t.d. hevur sent boð til barnið við kynsligum innihaldi ella hevur orðað eitt ynski um onkuntíð at møta barninum fysiskt ella á alnetinum ella líknandi (virtuelt).

Tað skal í hesum sambandinum innganga í metingini, um tað út frá málburði hjá gerningsmanninum, kunnu skiljast kynslig evni, hóast tað ikki er ítøkiligt, hvat hann ella hon ynskir at barnið skal gera. Tað vil eftir umstøðunum eisini kunna innganga í metingini, um gerningsmaðurin hevur sett seg í samband við fleiri børn á sama hátt, møguliga áður hevur framt kynslig brot móti einum barni, ella hevur myndir við kynsligum innihaldi av børnum á sínum talgildu eindum. Tað kann harumframt innganga í metingini, um gerningsmaðurin hevur sagt, at barnið ikki má siga foreldrum ella øðrum frá um sambandið millum partarnir.

Er hinvegin talan um ein persón, sum er fyltur 15 ár, er tað ikki revsivert at ganga inn í sambond sum eru sínámillum sjálvboðin. Tað vil tí vanliga verða torført at prógva, at ein persónur, sum hevur eitt spælandi, fríggjandi ella kynsliga løtt samskifti við ein persón yvir kynsliga lógaldurin, hevur tað við tilætlan um fremja kynsligt brotsverk móti mótpartinum.

Um ikki gerningsmaðurin hevur ein snildisligan (manipulerende) atburð av ávísum grovleika ella týðiliga misnýtir eina yvirvág í aldri og royndum, má tað vanliga leggjast til grund, at ætlanin við uppbyggingini av sambandi til ein persón yvir kynsligan lógaldur, er at hava eitt javnt og sjálvboðið kynsligt samband.

Tá talan er um persónar yvir kynsligan lógaldur, vil tað tí ikki vera nokk, at gerningsmaðurin letur sum um at hann er nøkur ár yngri ella eldri, ella pyntar uppá lívsrenslið, fyri at tykjast meira freistandi. Hinvegin kann tað eftir umstøðunum verða neyðug tilætlan til at bróta nýggju ásetingina, um gerningsmaðurin t.d. letst verða myndafólk, sum kann hjálpa órættaða í gongd við yrkisleið sum modell, við tí endamáli at fáa tann unga til at sýna seg nakin, senda nakinmyndir ella líknandi.

Ásetingin um lokking, sum verður skotin upp, er ætla at raka tilburðir, har tað ikki kann førast prógv fyri roynd at gera eitt ítøkiligt kynsligt brotsverk.

Tilburðir, sum í dag kunnu revsast sum roynd at bróta § 216, stk. 2 ella § 222 í revsilógini, í bæði førum eisini samanber § 225, skulu sostatt eisini framyvir revsast eftir somu ásetingum.

Hevur gerningsmaðurin t.d. skotið upp eitt ítøkiligt møti við eitt barn undir 15 ár, og gongur tað greitt fram t.d. av samskiftinum við barnið, at gerningsmaðurin hevði ætlan um at hava samlegu við barnið, kann tað, um hetta hendir sum avleiðing av eini lokkingartilgongd, eftir umstøðunum revsast eftir § 222 ella § 216, stk. 2 samanber § 21 í samanstoyt við nýgga lokkingarásetingina.

Um gerningsmaðurin í framhaldi av lokkingartilgongdini hevur framt blúnisbrot móti barninum ella tí unga t.d. við at senda kynslig boð ella myndir, kann tað revsast í samanstoyt við § 229. Somuleiðis kann tað revsast í samanstoyti við roynd at fremja blúnisbrot sambært § 232 samanber § 21, um gerningsmaðurin eggjar órættaða at senda kynsligt tilfar.

Tað liggur í lokkingini, at tað hendir ein snildisligan ávirkan av órættaða, soleiðis at barnið ella tann unga ikki neyðturviliga er greitt/greiður yvir, tað skemd viðkomandi verður útsettur fyri, fyrr enn møguliga nógv seinni. Tað er tó ikki til hindurs fyri at revsa eftir uppskotna ásetingini, at barnið ella tann ungi ikki upplivir at hava verið útsettur fyri skemd.

Skotið verður upp, at revsikarmurin verður sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

Við áseting av revsing, eigur millum annað at leggjast dent á, hvat sermerkir skemmandi atburðin, og vavi og longdin á skemmandi tilburðinum, umframt um gerningsmaðurin sjálvur hevur steðgað lokkingini.

Tað er annars upp til dómstólarnar ítøkiliga at meta um allar umstøður í málinum í hvørjum einstøkum føri.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting. Sambært § 3, stk. 1 í revsilógini er løgtingslógin galdandi fyri gerðir, sum eru framdar eftir, at løgtingslógin kom í gildi.
Av tí at talan er um revsiásetingar, verður mett best at lógin kemur í gildi ein ásettan dag soleiðis at eingin ivi er um, nær lógin kom í gildi.

Løgmálaráðið, 30. august 2023.

**Bjarni Kárason Petersen**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: